## Obama sáar iva um veðurlagsavtalu



Amerikanski forsetin, Barack Obama, ásannar, at ST-ráðstevnan, sum verður í Keypmannahavn í desember, er eitt sera gott høvi til at fáa eina veðurlagsavtalu í lag. Men hinvegin væntar hann ikki, at tað fer at bera til at gera nakra endaliga avtalu í Keypmannahavn. Við svensku tíðindastovuna TT sigur Obama, at tað ber neyvan til at loysa allar trupulleikarnar, men at tað ber til at taka eitt týðandi stig tann rætta vegin. TT fekk orð á Obama í sambandi við, at svenski forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, vitjaði forsetan í Hvítu Húsunum í gjárkvøldið.

## Tann síðsti í rættin

Argentinska dómsvaldið er farið undir at viðgera eitt rættarmál ímóti landsins seinasta einaræðisharra, Reynaldo Bignone. Saman við fimm øðrum fyrrverandi generalum er hann ákærdur fyri at hava burturflutt og pínt 56 fólk, sum virkaðu ímóti hernaðarstýrinum í sjeytiárunum. Allir seks nokta seg sekar. Umleið 130 fólk eru boðsend at vitna í málinum, sum ætlandi skal enda við dómi í februar. Mannarættindafelagsskapir siga, at næstan 30.000 argentinar hvurvu ella vórðu myrdir undir hernaðarstýrinum í árunum frá 1976 til 1983.

# Havbúgvin góðan túr undir Føroyum



*Havbúgvin er fyrrverandi Núpur. Teir høvdu góðan fiskiskap á seinasta túri Mynd: Skipalistin*

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið Havbúgvin landaði í Sørvági í gjár. Teir hava roynt vestanfyri og hava havt góðan fiskiskap.

Nú teir landaðu á landingarmiðstøðini í Sørvági, var veiðan umleið 100.000 pund, harav eini 70.000 pund var toskur.

Havbúgvin, sum er fyrrverandi Núpur, byrjaði túrin fyri lítlari viku síðan.

# 118 jólapakkar

FLØVI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Fólk í Nes kommunu hava givið 118 skógvaeskjur til Christmas Child-tiltakið í ár.

Tað skrivar heimasíðan hjá samkomuni Nebo á Toftum.

Lagt verður aftrat, at tilsamans komu 4.060 skógvaeskjur inn í ár, sum er 760 fleiri enn í fjør.

Skógvaeskjurnar verða sendar til Rumenia, har tær síðan verða givnar sum jólapakkar til børn, ið lítið og einki fáa til jóla.

Samkoman Nebo takkar fyri stuðulin og vónar, at enn fleiri verða við aftur komandi ár.




*Trolbáturin Randi er seldur til Hanstholm, haðani hann varð keyptur fyri nøkrum árum síðan*

# Randi er aftur í Hanstholm

**Trolbáturin Randi, sum Føroya Banki keypti á tvingsilssølu beint fyri ólavsøku í ár, er nú seldur til Danmarkar**

SKIP

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ein dani í Hanstholm, haðani báturin í sínari tíð varð keyptur til Føroya, sum hevur keypt Randi.

Teir fóru úr Føroyum við bátinum miðskeiðis í seinastu viku og komu til Hanstholm í øllum góðum sunnumorgunin.

Í Danmark skulu manningarrúmini umbyggjast, umframt at onkrar aðrar broytingar skulu gerast. Síðan fer danin, sum hevur keypt trolbátin, at brúka hann til vanliga ísfiskaveiði og til veiði eftir hummara.

### Kendi bátin

Edmund Jacobsen á vinnulívsdeildini hjá Føroya Banka sigur, at danin, sum hevur keypt Randi frá bankanum, misti sín bát í summar, tá hesin sakk, og nú Randi var til sølu, valdi hann at keypa trolbátin, sum hann kendi frá tí, at hann var heimahoyrandi í Hanstholm.

Tað var felagið Sp/f Randi á Toftum, sum átti bátin, ið er longdur í Vági og hevur fingið nýggja maskinu, meðan hann hevur verið heimahoyrandi í Føroyum.

Føroya Banki ynskir ikki at upplýsa søluupphæddina.

# Jákup B landaði í Klaksvík

**Í løtuni er streymurin heldur harður, og tí er lítil og eingin útróður beint í løtuni. Tá líkindini eru, og streymurin hevur verið í lagi, hava útróðrarbátar í Klaksvík fingið væl av fiski**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár landaði línuskipið Jákup B umleið 85.000 pund í Klaksvík. Teir royndu undir Føroyum, og meginparturin av veiðini var toskur.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík vænta tey partrolararnar Safir og Smaragd seinni í hesi vikuni. Teir koma helst inn at landa hósdagin.

Útróðrarbáturin Brandur fór við línu í gjárkvøldið, men teir eru ikki afturkomnir enn.

Streymurin er heldur harður, og lítil útróður er í løtuni.

Annars frættist úr Klaksvík, at útróðrarbátarnir hava fingið væl av fiski higartil í heyst, og meginparturin av tí, teir fáa, er toskur.




*Jákup B landaði í gjár, og hósdagin vænta tey í Klaksvík, at partrolararnir Safir og Smaragd koma inn at landa*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*